gult2 cyan2 magenta2 svart2



Markleysir møguleikar

Vit bjóða tveimum ungum fólkum læruplass á skrivstovu okkara í Saltangará og á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn. Her er møguleikin at fáa eitt starv, har ábyrgd og høvi at arbeiða sjálvstøðugt fylgjast. Her verður tú ílatin neyðugu brynjuna – bæði bókliga og verkliga – til framtíðar avbjóðingar, í Føroyum ella kring um í heiminum.

Talan er um eitt læruplass, har tú lesur HD, meðan tú vinnur pening. HD er í løtuni hægsta búskaparliga útbúgvingin, ið kann takast í Føroyum, og við HD prógvi eru dyrnar latnar upp fyri víðari útbúgvingum.

Velur tú at lesa cand. merc. aud. í Danmark, bjóða vit tær møguleika fyri farloyvi og møguliga kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark.

Velur tú at lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi í Føroyum, kanst tú gera tað, meðan tú arbeiðir hjá okkum.

Eftir at hava lokið cand. merc. aud. útbúgving, er møguleiki at gerast statsgóðkendur grannskoðari.

Rasmussen & Weihe er limur í heimsins størstu grannskoðarafyritøku PricewaterhouseCoopers, ið hevur meira enn 150.000 starvsfólk í okkurt um 150 londum. Hetta samstarvið gevur m.a. okkara starvsfólki møguleikar at fáa sær starvsroyndir uttanlands – í prinsippinum allastaðni, har PricewaterhouseCoopers er umboðað.

Sjálvandi dámar okkum best, at starvsfólk, ið gera eitt gott arbeiði, ynskja at verða verandi í virkinum hjá okkum. Men vit mugu ásanna, at nógv virki leita sær eftir dugnaligum starvsfólki hjá okkum. Hevur tú viljan og evnini til at fullføra eina útbúgving hjá okkum, hevur tú óivað nógvar møguleikar í framtíðini.

Endamálið við grannskoðan er m.a. at gera tað forarbeiðið, ið skal til, fyri at átekna upplýsingar frá einum virki til umheimin. Eina átekning, ið sigur, um upplýsingarnar eru rættvísandi.

Tú fert at læra frá botni um treytir og krøv til, hvussu grannskoðan skal útinnast, og vit stuðla tær sjálvsagt allan vegin í at fullføra málið, tú setur tær. Ráðgeving er ein týðandi partur av grannskoðarayrkinum og fer at verða ein stór avbjóðing til tína bókligu og verkligu vitan um fígging og búskap. Lóggáva og ikki minst okkara innanhýsis eftirlit, seta somuleiðis stór krøv til yrkisliga stigið á tínum arbeiði. Tað er ein treyt, at tú kennir fulla týdningin av hugtøkum sum álit, trúvirði, ábyrgd og tagnarskyldu.

Fakliga støðið verður bygt upp gjøgnum bókliga útbúgving og starvsvenjing – sigast má tó, at tað er neyðugt, at tú ert til reiðar at taka eitt stórt tak.
Hóast grannskoðan í sjálvum sær er eitt álvarsmál, leggja vit stóran dent á at hava eitt gott og óhátíðarligt umhvørvi á arbeiðsplássinum.

Førleikakrøv
Vit rokna við, at tú hevur tikið ella tekur studenta-, HF- ella HH prógv í summar, og tú kundi hugsað tær eina hægri búskaparliga útbúgving. Sum ein av teimum bestu í flokkinum, vænta vit, at tú hevur hug at sameina tað bókliga við tí verkliga, og at tú brennir eftir at sleppa at virka í vinnulívinum. Hóast tínar dygdir, fer útbúgvingin at verða ein stór avbjóðing.

Umsóknir
Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi innan 27. mai 2001. Størvini verða sett eftir summarfrítíðina 2001, men longu í juni mánaði kunnu vit gera eina setanaravtalu.
Hevur tú spurningar ella kundi tú hugsað tær at fingið meira at vita um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen á tlf. 31 10 17

Rasmussen & Weihe er eitt grannskoðara- og ráðgevingarfelag, sum varð stovnað í 1968. Umframt at gera lógarbundna grannskoðan, ráðgeva vit á økjum sum roknskapi, bókhaldi, stovnan av virkjum, rakstrarætlanum, skattamálum o.fl. Í løtuni eru vit 25 starvsfólk í virkinum.
Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn og ein skrivstova er í Saltangará.

Rasmussen & Weihe
Á Glaðsheyggi – Tórshavn

Vestmanna gongur undan

– At vegleiða og kunna um, hvat er gott fyri umhvørvið, ber avgjørt áøkst. Tilvitanin hjá vanligum fólki er størri í dag, men almennir myndugleikar halta framvegis aftaná, sigur Finnbogi Joensen úr Viðalundanevndini í Vestmanna, sum skipar fyri umhvørvisstevnu í næstu viku

UMHVØRVI
Turið Kjølbro

Annað árið á rað skipar Viðalundanevndin í Vestmanna fyri umhvørvisviku. Nevndin hevði 10 ár á baki í fjør og skipaði í tí sambandi fyri umhvørvisviku. Undirtøkan var so mikið góð, at Viðalundanevndin hevur gjørt av at taka táttin upp aftur í ár og um møguligt á hvørjum ári.

– Náttúran og umhvørvið eru lívsgrundarlagið hjá okkum. Endamálið við umhvørvisvikunum er at taka evni upp, sum hava almennan áhuga. Í fjør var evnið lívrunnið tilfar, hvussu tað kemur til høldar á bestan hátt, tí vit vita, at meginparturin verður koyrdur burtur, hóast nógv kann endurnýtast. Í ár er skráin meiri samansett, til dømis verða firðirnir viðgjørdir við tí fyri eyga, at alivinnan kann gera nakað við trupulleikan sum er av dálkingini. Verður vistfrøðiliga javnvágin á firðunum burtur, endar tað galið, sigur Finnbogi Joensen frá Viðalundanevndini í Vestmanna.



– Náttúran og umhvørvið eru lívsgrundarlagið hjá okkum. Fara vit ikki væl um náttúruna, endar galið, sigur Finnbogi Joensen, frá Viðalundanevndini í Vestmanna

Góðar ábendingar

Úrslitini av umhvørvisvikuni í fjør hava verið ógvuliga positiv, eitt nú var sokallaði grøni skúlin settur á stovn, og Finnbogi Joensen vónar, at eitt úrslit av umhvørvisvikuni í ár verður, at ein umhvørvisstova verður sett á stovn í Føroyum.

– Verður ein Agenda-traktat gjørd fyri Føroyar, kann ein umhvørvisstova setast á stovn, har allar kommunur í Føroyum eru við. Hendan stovan skal vegleiða um umhvørvið fyri alt Føroya fólk. Útlit eru til, at hon verður veruleiki, og tað verður Heilsufrøðiliga starvsstovan sum fer at umsita hana.

Almennu myndugleikarnir í Føroyum halta langt aftaná, tá ið tað ræður um náttúru- og umhvørvisvernd.

– Sum heild eru føroyingar alt ov lítið vitandi um umhvørvið, men nú vit royna at seta ljóskastaran á náttúru og umhvørvi, fáa vit fyrispurningar frá fólki úr øllum landinum um, hvussu vit arbeiða. Tilvitanin hjá fólki er størri í dag enn tá ið byrjaðu, tað merkist týðiliga, at tosa fólk meiri um umhvørvið. Tí er týdningarmikið at fáa børnini við, og ein partur er at læra tey at skilja rusk sundur í lívrunnið, vandamikið og annað, sigur Finnbogi Joensen.

Finnbogi Joensen harmast um, at bæði IRF og KOB brúka skeivu litirnar til posarnar til rusk. Vandamikið burturkast fer í teir grønu posarnar ístaðin fyri reyðar, og pappír fer í bláar posar í staðin fyri grønar.

– Børn verða ørkymlað, tá ið litirnir á henda hátt verða blandaðir saman, men vit arbeiða við at fáa hesi viðurskiftini uppá pláss, sigur Finnbogi Joensen.

Umhvørvið er so nógv

Viðalundanevndin í Vestmanna arbeiðir sostatt ikki bert við spurningum, ið snúgva seg um trø og gróður. Í umbúna er at gera eina vegleiðing um, hvussu fólk fáa lívrunnið tilfar til høldar, og hvarnirnar, tey hava tikið í brúk til at mæla greinar og jólatrø, eru at síggja úti um landið eisini.

– Nevndin er í dag meiri ein náttúru- og umhvørvisnevnd. Vit ráðgeva eftir førimuni um viðurskifti, sum snúgva seg um náttúru og umhvørvi sum heild. Eitt nú hava vit kannað, hvat fyri trø og runnar støðast væl í Føroyum, og í tvey ár hava vit givið runnar til bygdafólkið í Vestmanna. Tey hava tikið ógvuliga væl ímóti hesum, og síðani vit byrjaðu fyri 11 árum síðani, eru nógvir sera vakrir urtagarðar komnir, greiðir Finnbogi Joensen frá.

Nógv á skránni

Umhvørvisvikan fer fram í miðhøllini í Vestmanna skúla í døgunum 14. til 18. mai. Mánakvøldið 14. mai setir Eyðun Eltør, landsstýrismaður, umhvørvisvikuna. Evnið á fyrsta kvøldinum er, hvussu firðirnir kunnu haldast vistfrøðiliga reinir fyri burðardyggari vinnu. Finnbogi Joensen, vegna Viðalundanevndina, Johanna Olsen, vegna Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Hans Jacobsen, vegna Havbúnaðarfelagið, og Torleif Dalsgarð, verkfrøðingur, leggja fram. Kvøldið eftir røða Finnbogi Joensen, umboð fyri Vestmanna kommunu, og Arne Poulsen, aðalstjóri í Vinnumálastýrinum um, hvussu bygdirnar kunnu vetrarfriðast. Mikukvøldið 16. mai er evnið grønir skúlar og stovnar. Spurningurin at umrøða er, um til ber at fáa undirvísingartilfar um náttúru og umhvørvi inn í skúlarnar. Tey ið leggja fram eru Finnbogi Joensen, Jenny Lydersen, frá Mentamálastýrinum, Bjørn Jacobsen frá Miljøheimevernet, og Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður.

Hvussu vit kunnu gagnnýta alt lívrunnið tilfar, og hvussu vit kunnu gera eina Agenda-traktat fyri Føroyar er evnið á fundinum hóskvøldið. At viðgera hendan spurningin fara Finnbogi Joensen, Bjørn Jacobsen, Barbara Samuelsen vegna Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Sveiney Sverrisdóttir vegna Føroya Kommunufelag.

Fríggjadagurin er settur av til at rudda Vestmanna bygd. Tá fara arbeiðsfólk hjá kommununi, lærarar og næmingar runt bygdina við grønum og reyðum posum eftir ruski og øðrum.

Lesiveik fáa onga hjálp

– Tá ið tað snýr seg um at hjálpa børnum, sum hava lesitrupulleikar, eru Føroyar eitt sera tilafturskomið land, sigur Anna Karin Kjeld, stigtakari til stovnan av stuðulsfelag fyri børn við lesitrupulleikum

STUÐULSFELAG
Turið Kjølbro

Leygardagin í næstu viku verður stuðulsfelag fyri børn við lesitrupulleikum stovnað. Tikið stig til stovnanina hevur Anna Karin Kjeld í Funningsfirði.

– Tá ið tað snýr seg um at hjálpa børnum, sum hava lesitrupulleikar, eru Føroyar eitt sera tilafturskomið land. Skúlamyndugleikar og aðrir myndugleikar duga ikki at meta um trupulleikan, eingin hjálp er at fáa nakra staðni og børnini eru tapararnir. Trupulleikarnir verða kveistraðir undir teppið, og fólk tora ikki rættiliga at tosa um teir. Í mun til í øðrum londum veit eingin í Føroyum, hvussu hesi børnini kunnu verða hjálpt, sigur Anna Karin Kjeld.

Hon vísir á, at uml. 2-3 børn í hvørjum skúlaflokki hava lesitrupulleikar.

– Í onkrum førum fáa næmingar eina rúgvu av tilfari, sum er ætlað sum hjálp, men eingin spyr ella leggur í, um nakað úrslit kemur burturúr. Tað er rætt og slætt einki skil á.

Endamálið við stuðulsfelagnum er fyrst og fremst at savna foreldur at børnum við lesitrupulleikum saman.

– Vit hava tørv á at koma saman og tosa um trupulleikarnar og hjálpa hvør øðrum. Sum foreldur kenna vit okkum ógvuliga einsamøll í so máta. Síðani kunnu vit arbeiða fram ímóti at ávirka myndugleikarnar soleiðis, at eitthvørt verður gjørt fyri hesi børnini.

Anna Karin Kjeld vónar, at nógv foreldur at børnum við lesitrupulleikum møta á stovnandi fundinum. Fundurin verður í Felagsskúlanum á Oyrabakka leygardagin 19. mai. Við á fundinum vera eisini lærarar, sum arbeiða við børnum, ið eru lesiveik, sálarfrøðingar, heilsusystrar og sjúkrasystrar, sum fara at lýsa trupulleikan.

gult3 cyan3 magenta3 svart3